Hetta er í fínasta lagi

– Ein almennur fiskidagabanki hevði givið okkum nógvar møguleikar, sum vit ikki hava við skipanini, sum er, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins

ÁKI BERTHOLDSEN

–Fiskidagaskipanin førir til ov nógva spekulatión . Men tað eru eisini fleiri aðrir vansar við henni.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins heldur tí, at tað er í fínasta lagi at Búskaparráðið tekur málið um, hvussu fiskidagaskipanin verður umsitin. upp

Og hann heldur, at tilmælið um at stovna ein almennan fiskidagamarknað er ógvuliga áhugavert.

Formaður javnaðarfloksins heldur nevniliga, at tað hevur nógvar óhepnar avleiðingar við sær, soleiðis, sum fiskidagaskipanin verður umsitin nú.

Hann sigur, at javnaðarflokkurin hevur altið verið ímóti at tað skal bera til at keypa og selja fiskidagar.

–Vit vita, at har fiskirættindi eru søluvøra, eitt nú í Íslandi, førir tað til at fiskivinnan miðsavnast á nøkrum fáum hondum og tað fer eisini at henda í Føroyum.

– Tað er eisini ódámligt, at keyp og søla av fiskirættindum verður gjørt til ein vinnuveg í sær sjálvum, har spekulantar fáa sær tað til livibreyð at keypa og selja fiskirættindi.

Jóannes Eidesgaard sigur at sostatt hevur javnaðarflokkurin ikki skift støðu, hóast Búskaparráðið nú mælir til at umsita skipanina øðrvísi.

Men skulu vit hava hesa skipanina, tekur hann undir við grundgevingini hjá búskaparráðnum fyri at gera ein almennan fiskidagamarknað.

–Støðan er jú tann, at reiðarar fáa fiskidagarnar ókeypis frá tí almenna. Og viðhvørt kunnu vit enntá undrast á, hví júst ávísir reiðarar fáa tey fiskirættindini, teir fáa.

Hann spyr, hvussu tað m.a. ber til, at reiðarar ár um ár kunnu fáa fiskirættindi, sum teir ongantíð brúka, men sum teir bara hava til at selja, so teir kunnu stinga pengarnar í lumman?

– Tá mátti tað verið rímiligari, at rættindini vórðu latin onkrum, sum veruliga brúkti tey.

Hann sipar eisini til spekulatiónina, táið skip verða keypt og seld.

Tá eru tað ikki virðið á sjálvum skipinum, sum er avgerandi.

Hinvegin er tað virðið á fiskirættindunum, sum fylgja við skipinum, sum skrúva prísin upp, so at skip verða mangan handlað fyri heilt óverulig virði.

Hann vísir eisini á, at sum støðan er, er tað at kalla vónleyst hjá ungum monnum at koma framat í fiskivinnuni, tí teir fáa ongi fiskirættindi, uttan at teir keypa tað í dýrum dómum frá einum privatum reiðara.

So hann heldur, at í løtuni liva vit ikki upp til ásetingina í lógini um, at tilfeingið er ogn Føroya fólks.

Skipanin staðfest

Formaðurin í javnaðarflokkinum sigur, at kemur málið um ein almennan fiskimarknað til viðgerðar, fer flokkurin at viðgera málið við stórari vælvild.

Hann sigur, at ein almennur fiskidagabanki kundi eisini gjørt skipanina liðiligari, so at fiskiloyvini at kalla ikki grógva føst í ávísar reiðarar.

Jóannes Eidesgaard heldur eisini, at ein fiskidagamarknaður kundi ført til nógv størri dynamikk í vinnuni, tí tað hevði borið nógv betri til hjá nýggjum fólki at gjørt seg galdandi.

Somuleiðis kundi ein almennur fiskidagamarknaður blivið eitt sera hent amboð hjá fiskimálastýrinum at regulera fiskivinnuna so at tað kundi hildið døgum aftur, um trýstið á stovnarnar bleiv ov stórt.

– Men ein banki kundi eisini givið fólki í fiskivinnuni nógv betri møguleikar at roynt seg fram og til at fingið fiskidagar til at gingið nýggjar leiðir.

– Sum skipanin er, verða reiðarar sum longst noyddir til at krøkja seg í fastar í tað, teir hava.

– Tann størsti ágóðin er kanska tann, at vinningurin av at keypa og selja fiskirættindi, kemur øllum fólkinum til góðar.

– Men so langt kemur tað neyvan, tí samgongan hevur júst staðfest skipanina, sum hon er.

– Tað gjørdi samgongan nú um dagarnar, táið hon fekk tingið at samtykkja, at inntøkurnar av at selja fiskidagar skulu skattast og hinvegin skulu útreiðslurnar av at keypa fiskidagar kunna dragast frá í skatti, sigur Jóannes Eidesgaard.

Bæði fyrimunir og vansar

Formaðurin í vinnunevnd løgtingsins heldur, at tað eru bæði fyrimunir og vansar við einum fiskidagabanka

ÁKI BERTHOLDSEN

Hvørt øki í landinum skuldi heldur fingið sínar fiskidagar, sigur Heini O. Heinesen

– Eg ivist í um ein fiskidagabanki er tað rætta.

Ein av fremstu framsøgumonnunum hjá samgonguni í fiskivinnumálum, Heini O. Heinesen, formaður í fiskivinnuni, tekur ikki treytaleyst undir við hugsanini hjá Búskaprráðnum um at gera ein almennan fiskidagamarknað. Hann sigur, at ein fiskidagamarknaður samsvarar í hvussu so er ikki við ætlanirnar um fríar ræsur at keypa og selja fiskidagar, uttan so, at tann, sum fyrst keypir fiskidagar, eigur teir næstan í allar ævir og so kann handla teir víðari.

Hann ivast somuleiðis í, um tað er rætt, at ongin skal sleppa at fiska, uttan at hann fyrst skal hava verið noyddur at keypa sær fiskidagar frá tí almenna.

Hann heldur eisini, at ein fiskidagamarknaður er tað sama sum at stýra fiskivinnuniament, og tað hava vit ikki altíð havt so góðar royndir av.

Formaðurin í vinnunevndini sigur, at endamálið við fiskidagaskipanini var, at tað helst skuldi mangla fiskidagar fyri at avmarka fiskiskapin. Leypa fiskidagar, er tað ikki avmarkandi og so er eisini smáligt við keypi og søla av døgum.

Tó heldur hann, at ein slíkur fiskidagabanki kundi verið brúktur til at stýrt trýstinum á fiskastovnarnar við.Tí vísir tað seg, at trýstið á onkran stovn verður ov hart, kundi tað almenna bara avmarka útboðið av fiskidøgum.

Heldur út til økini

Heini O. Heinesen sigur, at verður tað frítt at keypa og selja fiskidagar, fara teir, sum tað gongur gott hjá, at keypa allar dagarnar.

–Sostatt er vandi fyri at fiskirættindini verða miðsavnað í ávísum økjum í landinum og at summi øki í afturfyri koma at liggja við ongum rættindum, áðrenn tey vita av.

Tí tekur formaðurin í fiskivinnunevndini heldur undir við, hvørt øki í landinum fær tillutað eitt ávíst fiskidagatal. Tað hevði fordað fyri miðsavningini og fyri at summi øki komu at liggja øskukøld, sigur Heini O. Heinesen.

Bara nøkur fá fáa vinningin

Tað er meiri rættvíst at tað almenna sjálvt selur fiskidagar á uppboði, heldur Búskaparáðið

ÁKI BERTHOLDSEN

Er tað rímiligt, at fiskidagar, sum tað almenna hevur latið ókeypis, verða seldir við stórum vinningi?

Hendan spurning hevur Búskaparráðið sett sær í seinastu frágreiðingini, sum kom út í farnu viku.

Sjálvt heldur ráðið ikki, at tað er rímiligt.

Tí heldur tað, at tað rættasta hevði verið, um landsstýrið sjálvt seldi fiskidagar.

Tvs, at tað er ein meirluti í Búskaparráðnum, sum heldur hetta, tí tað er ikki heilt samt um hesa niðurstøðu. Einasti reiðari í Búskaparráðnum, Anfinnur Olsen, er ímóti at tað almenna skal selja dagar. Hann heldur, at vinnan hevur søguligan rætt til at keypa og selja fiskidagar og tað skal varðveitast.

Almenna selir dagar

Men meirilutin í Búskaparráðnum heldur ikki, at tað er rættvíst, at reiðarar skulu sleppa at selja fiskidagar við stórum vinningi, um teir hava fingið ókeypis frá tí almenna.

– Tað er eisini komið fyri, at tað almenna hevur latið skipum endurgjald fyri fiskirættindi, sum tað almenna upprunaliga læt hesum skipum ókeypis.

Búskaparráðið leggur dent á, at tað tekur undir við, at tað skal bera til at keypa og selja fiskidagar.

– Men ávísir hættir at umsita fiskidagarnar kunnu tykjast meiri í samsvar við tað, sum er rætt og rímiligt, sigur ráðið.

Ráðið sigur, at higartil hevur tað ikki vilja lagt seg út í, hvussu fiskidagaskipanin verður umsitin, men nú tykist tað sum um vit eru komin til eitt vegamót. Tí hevur tað nú tikið tveir avgerandi spurningar í skipanini upp: Nevniliga, hvør selur og, hvat verður selt.

Sum er, kunnu skip keypa og selja fiskidagar ímillum sín, uttan at nøkur samsyning verður latin til tað almenna.

Men tað hevði eisini borið til, at tað almenna sjálvt bjóðar fiskidagar til sølu á uppiboði

Ímóti lógini

Búskaparráðið vísir til lógina um vinnuligan fiskiskap, har tað stendur, at livandi tilfeingið er ogn Føroya fólks og at rættindi, sum verða latin, veita ikki nøkrum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi takast aftur uttan endurgjald.

Búskaparráðið heldur tí, at sum er, kann skipanin føra við sær, at ágóðin av tilfeinginum undir Føroyum verður tilvildarliga ognað nøkrum fáum og tað er í stríð við ásetingina í lógini um, at tilfeingið er ogn Føroya fólks.

Annar trupulleiki við skipanini íløtuni, er, at tað verður trupult hjá ungum fólki, sum hava hug at royna fiskivinnu sum vinnuveg, at sleppa framat, uttan fyrst at betala dýrt fyri at keypa fiskirættindi- rættindi, sum teir, ið selja, áður hava fingið ókeypis.

Hetta er heldur ikki í samsvari við eina aðra meginreglu í lógini, sum sigur, at fiskifør undir føroyskum flaggi skulu hava so fría atgongd sum gjørligt til tilfeingið.

Búskaparráðið sigur, at triði vansin við skipanini í løtuni, er, at um tað verður ov trupult at koma uppí part, kann hon fara at líkjast einum einkarrætti og so kann hon blíva óeffektiv.

Tí er tað neyðugt at tryggja eina neyðuga útskifting, sigur Búskaparráðið.

Ráðið sigur, at skulu vit fáa eina støðuga vinnu,ið fær undirtøku sum fráliður, er tað tí neyðugt at finna eina skipan, sum bæði verður uppfatað sum rættvís og effektivitetsfremjandi.

Og tað er ivasamt við skipanini, sum er, bara fyri tað um reiðarar fáa rúmari ræsur at keypa og selja fiskidagar.

Tí heldur meirilutin í Búskaparráðnum, at tað almenna skal gera ein fiskidagabanka sum reiðarar so kunnu keypa dagar úr.

– Tað hevði tryggja effektivitet og avkast. Tað hevði eisini tryggja fríari atgongd til at fiska, samstundis sum tað hevði tryggjað, at ognarrættur og avkast kemur øllum Føroya fólki til góðar, sigur Búskaparráðið.

– Fiskivinnan verður jagstrað

Bjarti Mohr, stjóri á Kongshavnar Trolarafelag, er í øðini inn á Búskaparráðið, sum vil hava fiskidagarnar seldar á uppboði. – Her er talan um jagstran av fiskivinnuni, sum ikki hevur ein livandi kjans at klára seg, um vit í framtíðini skulu keypa fiskidagarnar, sigur hann

SVEINUR TRÓNDARSON

Um dagarnar kom seinasta frágreiðingin frá hesum Búskaparráðnum, og ikki kann sigast annað, enn at hon hevur vakt stóran ans - serliga í fiskivinnuni.

Tað er uppskotið frá ráðnum um, at fiskidagarnir í framtíðini skulu seljast á uppboði, sum serliga hevur fingið reiðarar at vakna við kaldan dreym.

Ein teirra er Bjarti Mohr, sum er stjóri í fyritøkuni Ísbjørnini, ið umframt at hava virkið í Álakeri, eisini hevur tríggjar trolarar.

– Hetta er einki minni enn jagstran av fiskivinnuni, sigur Bjarti Mohr, sum heldur, at Búskaparráðið ikki hevur ánilsi av, hvussu nógv verður lagt fyri á fiskigrunnunum

Ikki nóg mikið til nýíløgur

– Eg haldi, at tað er ótrúligt, at teir ditta sær at koma við hesum uppskotinum, bara tí at vinnan hevur klárað seg nøkunlunda í tvey ár. Hesi ár hava verið heilt óvanlig, bæði hvat viðvíkur veiðu, prísi, rentustøði og oljuprísi og longu nú eru broytingar farnar fram, sum gera, at skipini verri enn so koma at hava sama góða úrslit, sum hesi bæði seinastu árini, sigur Bjarti Mohr.

Hóast umstøðurnar hava verið góðar, so hevur vinnan kortini ikki klárað seg betri enn væl. Enn er alt ov lítið avlop til, at vinnan hevur møguleika til at endurnýggja seg. Tí heldur Bjarti tað vera púra burturvið, at koma við hesum uppskoti, sum beinleiðis er steinur omaná byrðu.

Men skilir tú ikki grundgevingina um, at tilfeingið er ogn Føroya fólks?

– Jú, men tann skipan, sum vit hava í dag, er kanska besta trygdin fyri, at so stórur partur av Føroya fólki fær gagn av tilfeinginum, tí tey leggja fiskin upp á land, og geva harvið nógv arbeiði.

Eingin vil gjalda

Ein spurningur, sum Bjarti hevur gingið við í høvdinum síðani frágreiðingin frá Búskaparráðnum kom, er, hvør skal gjalda fyri fiskidagarnar. Enn er hann ikki komin til eitt svar, tí tað heldur hann vera sera torført.

– Hýruparturin í Føroyum er tann dýrasti í heiminum, og eg trúgvi neyvan, at Fiskimannafelagið vil, at teirra limir skulu gjalda fyri fiskidagarnar. Samstundis er oljuprísurin tvífaldaður meðan veiðan stendur so at siga í stað. Tí dugi eg ikki at síggja stórvegis møguleikar fyri at skipini klára at gjalda fyri fiskidagarnar.

Men er tað ikki nakað um, at tað er torført hjá yngri fólki at sleppa upp í part í vinnuni?

– Nei, tí eri eg ikki samdur í. Eg byrjaði við hesum felagnum í 1997, so at siga á berum. Nú hava vit trý skip umframt hetta virkið, og einasta orsøk til, at vit hava klárað tað er, at vit hava tikið okkara kjansir. Tann dagin vit ikki tora at taka kjansir longur, kunnu vit steingja og flyta av landinum, sigur Bjarti.

Kenna ikki fiskivinnuna

Nú hendan frágreiðingin hjá Búskaparráðnum er komin á borðið, heldur Bjarti, at hon vísir, at tey sum hava gjørt hana, eru fólk, sum ongar royndir hava í fiskivinnuni.

Mynd: Jens Kristian Vang

– Uppskotið frá Búskaparráðnum um at fiskidagar skulu seljast á uppboði, er burtur úr vón og viti, sigur Bjarti Mohr, sum umframt virkið Ísbjørnina eisini rekur tríggjar trolarar

– Eingin av teimum, sum sita í Búskaparráðnum, hevur arbeitt so mikið við fiskivinnuni, at teir vita, hvat fer fram har. Teir tosað eisini um at avtaka skattafrádráttin hjá fiskimonnunum, og tað haldi eg er burtur úr vón og viti. Hugsið tykkum, hesir menninir stíðast og strevast hvønn dag, og seta enntá lívið í vága fyri, at samfelagið kann hanga saman, og so vil mann taka hendan lítla ágóðan frá teimum, sigur Bjarti.

Hann hevur annars eisini heft seg við, at Búskaparráðið bara leggur upp til, at fiskidagar skulu seljast á uppboði. Tað heldur hann vera løgið. Tí so skuldu bæði bóndagarðar og alibrúk komið undir somu treytir.

Hava keypt loyvini einaferð

– Vit hava í veruleikanum keypt fiskiloyvini táið vit keyptu skipini, og tí máttu vit gjalda so nógv fyri skipini. Verða loyvini tikin frá okkum nú, so skrædnar øll vinnan í einum, tí so missa skipini virði, tí eingin hevur ráð at keypa tey aftur, sigur Bjarti Mohr, sum eisini heldur, at Sparikassin má hava ein trupulleika við heskanska, at hann hevði ynskt, at loyvið til at reka pengingastovn skuldi verið endurnýggjað hvønn mánað? Nei, hetta er í veruleikanum ein jagstran av fiskivinnuni, sigur Bjarti.

Ísbjørnin farin í gongd aftur

Mánadagin byrjaði framleiðslan á Ísbjørnin aftur, eftir at virkið hevði verið stongt síðani hálvan desember

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyri hálvum øðrum mánaði síðani varð virksemið á fyritøkuni Ísbjørnin í Álakeri lagt stilt.

Framleiðslan skuldi leggjast um fyri at fáa meira burtur úr rakstrinum, og tí var fólkið sent til hús fyribils. Hetta arbeiðið er nú liðugt og mánadagin lat Ísbjørnin uppaftur.

Bjarti Mohr, stjóri á virkinum sigur, at framleiðslan nú er løgd um soleiðis, at produktskráin er einfaldari enn hon var áður.

– Tað skuldi havt við sær, at tað skuldi verið lættari at havt eftirlit við framleiðsluni og í síðsta enda at vit fingu meira burturúr, sigur stjórin.

Umleggingin hevði við sær, at Ísbjørnin skuldi leggja eitt nýtt framleiðsluupplegg fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og sum vera mann varrð hetta gjørt áðrenn virkið lat uppaftur. Vit spurdu stjóran um krøvini høvdu við sær eykaútreiðslur fyri virkið.

– Nei, tað høvdu tey ikki, men vit máttu gera nakrar broytingar soleiðis, at vit kundu lúka treytirnar.

Annars letur stjórin ikki illa at úrslitinum fyri í fjør, hóast virkið kundi tikið ímóti tvífalt so nógvari rávøru, sum tað veruliga gjørdi.

– Vit tóku ímóti 5-600 tonsum, men kundu tikið ímóti 12-1300.

Ísbjørnin turkar upsa og annað, sum síðani verður selt gjøgnum Faroe Seafood Prime.

Tað arbeiða eini 20-25 fólk á Ísbjørnini og tað er á leið tað sama, sum tað gjørdu áðrenn virkið lat aftur í desember.

TILBOÐ
FEBRUAR TILBOÐIÐ !
FUJITSU SIEMENS COMPUTERS
AMD K6-2 400 Mhz (Minitower)
32 Mb SD RAM - 4,3 Gb Harðdisk
2D/3D 8 Mb grafikk - PCI Enhanced IDE
512 Kb cache - 40 x speed CD-ROM
56 K/V90 Modem - 16 bit ljóðkort - Hátalarar
Windows 98DK (CD) - Hot-key knappaborð & mús
17" SVGA monitor MPR-II - Works 4,5 DK
400
einans kr. 8.990,- V/MVG
Sama telda UTTAN skerm
einans kr. 6.490,- V/MVG
Umframt hetta góða tilboð hava vit eitt breitt úrval av dygdar telduvørum!
Fíggjan kann útvegast!
Leveringstíð: uml. 1 vika
Stiðjagøta 5
100 Tórshavn
Tlf. 31 11 15
www.formula.fo
E-Mail: pp@formula.fo
Opið er:
Mánadag-friggjadag: 9.00-17.30
leygardag: 11.00-14.00
formula micro - tín telduhandil